## VIÐMERKINGAR

# Er Karsten Hansen í lummanum hjá Føroya Arbeiðarafelag?

Nú hoyrist í fjølmiðlunum, at Karsten Hansen aftur hevur verið uppá spæl viðv. samdøgur-frádráttinum hjá handverkarum, ið arbeiða uttanlanda.

Tann 09.07.01 vóru umboð fyri bæði Landsfelag Handverkaranna og Føroya Handverkarafelag á fundi í Fíggjarmálastýrinum um samdøgurfrádráttin, og vóru har eisini umboð fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag við á fundi, og var tað týðuligt, hvør hevði biðið um henda fundin.

Har førdu arbeiðsgevararnir fram, at frádrátturin hjá handverkarum, sum arbeiða uttanlanda, mátti strikat av teirri orsøk, at tað ikki var møguligt at fáa handverkarar at koma heim at arbeiða.

At tað er ringt at fáa handverkarar, er ikki so undarligt, tí at tímalønin, t.d. í Danmark er so nógv hægri enn í Føroyum,150,- til 170.- kr. pr. tíma.

So tað sigur seg sjálvt, at tað at lækka frádráttin ikki fer at lokka handverkarar at koma heim aftur at arbeiða, men ger kanska tað, at fleiri velja at flyta til útlandið, og hvat er tá vunnið?

Tað einasta, sum kundi verið við til at fingið teir heim aftur er, at tímalønin hjá okkum verður hækkað so mikið nógv, at hon er á leið við lønina rundan um okkum, og at skatturin eisini verður lækkaður fyri allar lønmóttakarar.

Tá reiðararnir í síni tíð gramdu seg um, at teir ikki fingu fólk umborð í skip síni, tí at menn heldur valdu at fáa sær hýru við eitt nú norskum skipum, var leyst og liðugt hjá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, sum beinanvegin kom við eini lóg, sum gav fiskimonnum 15% í reinum skattalætta, og tað sjálvt um inntøkurnar við skipunum vóru somikið stórar, at tær als ikki kundu samanlíknast við handverkaralønirnar her á landi, og síðani hevur man skilt,at tað næstan er ógjørligt at fáa kjans við føroyskum skipum. Ikki tí, tað skal vera sjómonnunum hjartaliga væl unt, hetta var bert fyri at samanlíkna hesar báðar bólkarnar.

Á nevnda fundi segði Karsten Hansen eisini, at hann fór at taka avgerð sjálvur, og at hann ikki hevði fyri neyðini at taka handverkarafeløgini við uppá ráð, men bert hevði boðið okkum við til henda fund fyri ein ordans skuld.

Niðurstøðan hjá okkum umboðum fyri L.F.H. og F.H.F. eftir fundin var, at avgerðin longu varð tikin, áðrenn fundurin varð settur.

Út frá hesum má sláast fast, at Arbeiðsgevarafelagið enn einaferð hevur megnað at fingið Karsten Hansen við til at vinna handverkarastættini neisur við at minka nevnda frádrátt, og tí eiga eftir okkara metan allir handverkarar, og eisini aðrir lønmóttakarar at hugsa seg væl um, táið krossurin skal setast til næsta val.

**Vegna Landsfelag Handverkaranna**

**Eli Brimsvík**
**Formaður Havnar Handverkarafelags**

# Næstan 2000 á vørumessu

**Væl meira av fólki vitjaði vørumessuna í ár enn undanfarna ár**

Bæði útstillarar og vitjandi vóru væl nøgd við vørumessuna, sum var farna vikuskiftið í Havn. Støðið var sum heild væl hægri enn undanfarin ár, og útstillararnir høvdu gjørt nógv við sínar básar.

35 virki og fyritøkur vóru við á vørumessuni, og í ár vitjaðu 1900 fólk messuna. Í fjør vóru 1200 fólk á messuni, so talan var um fittan vøkstur í ár.

Vakrasti básur á vørumessuni var básurin hjá P/F Poul Michelsen, ið í ár var lagdur til rættis av reklamuvirkinum Petur og Petur. Har var nógv gjørt burtur úr, og millum annað serveraðu næmingar frá Handilsskúlanum í Havn kaffi og køkur til kundarnar.

Eimskip varð kosið at hava næstbesta básin.

Høvuðsvinningurin var ein málningur av listamanninum Eli Smithð, og motivið var útsýnið av Skálatrød í Havn. Málningurin varð handaður Claus Mørkøre, sølustjóra hjá P/F Poul Michelsen.

Onnur virðisløn var ein sera vøkur og heldur sjáldsom dekoratión sum var bygd oman á ein viðarbul. Tað var arbeiðsfólkið á Verkhúsinum Stíggjur í Saltangará sum hevði gjørt dekoratiónina. Tað var Poulina Johansen leiðari á Verkhúsinum Stíggjur sum handaði stjóranum á Eimskip í Føroyum dekoratiónina.

Komandi vørumessa verður hin fimta í røðini og verður í 6 - 8 sept. 2002.

# Minningarorð um Elisabeth Simonsen

Stórur skari fylgdi Elisabeth til seinasta hvíldarstað hennara, og vøkru orðini hjá presti í kirkjuni fara ikki frá mær.

Tað er so, at tú saknar orð í slíkum stundum. Eg fari tó at royna at siga eitt sindur um systkinabarn mítt Elisabeth.

Elisabeth var einkardóttir Miu og Mo Simonsen í Sørvági. Í heimi hennara búði eisini Hans abbi og so háttvirda kettan »Gagg«.

Vit vóru javngamlar og spældu saman alt eg kann minnast. Spælipláss var allur Liðagarðurin og so áin, sandurin og sjógvurin.

Viðhvørt fekk Elisabeth eitt droymandi eygnabrá, tað var táið hon tosaði um at fara á seiðaberg, tað tímdi eg ongantíð, so heldur umborð á »Sjønning«, sum lá og fúnaði uttan fyri hjá Hugo. Har kundu vit droyma okkum burtur í fremmand lond. Ella vit spældu »Korn« við garðin hjá Dunga Betty, bygdu hús úr sandi ella leitaðu eftir »leika« í ánni og goymdu hesi fínu postalínsbrotini í hjallinum.

Inni hjá Miu og Mo var heimligt og trygt. Har hoyrdist ongantíð róp og gangur, tí bæði Mia og Mo vóru friðarfólk. At koma inn til teirra var sum at koma heim.

Fast pláss á bonkinum, har abbi lá og durvaði, Elisabeth sat og át breyð og eg fekk biddað mær skorpuna av hesum breyði, sum Mia so meistarliga hevði bakað. Viðhvørt vóru fólk inni, sum søktu sær heilsubót hjá Miu, sum var sjúkrasystir, men altíð hevði hon tíð at práta við okkum børn. Ella lesa »Lillepus« úr »Hus og Hjem«.

Nógv samband var ímillum mítt heim og tað hjá Elisabeth. Eg trúgvi neyvan, at tað fór dagur uttan at onkur hevði verið inni og vitjað.

Mia var ættað av Hvítanesi og tað neyt eg gott av, tí eg slapp við at ferðast eitt summarið á Hvítanesi og eisini til Mykinesar, tí har búði Esther, systir Miu. Einaferð búði eg hjá Elisabeth, og hetta er eitt av mínum bestu barndómsminnum.

Tað er torført at greiða frá, hvussu nógv tað hevur at siga, at tú nærum er vaksin upp saman við einum menniskja og síðani missir tað, tað er sum ein partur fer av tær sjálvum.

Vit gingu í flokki saman og nutu fyrstu ungdómstíðina saman. Síðani kom vaksnamannalívið og vit fóru í hvør sína ætt.

Sambandið mistu vit tó ongantíð við hvørja aðra. Hóast gerandisdagurin fer avstað við nógvari tíð, so fylgdu vit við, hvussu gekk hvør hjá aðrari, fingu børn, vóru gummur hvør hjá aðrari og prátaðu saman av og á, antin í telefonini ella eg stakk høvdið inn um á Spógvavegi at vita, hvussu stóð til. Nakrar ferðir var hon og vitjaði meg, og øll, sum kendu Elisabeth, vita, at hon hataði at sigla, so hetta var satt bragd.

Seinasta ferðin, vit sóust, var hon nógv merkt av sjúku, og eg eri glað fyri at eg fekk sagt farvæl við hana, hóast eg ynskti av øllum hjarta, at hon mátti fáa nøkur ár afturat.

Tungt er at missa bæði hjá familju og vinum. Eg veit, at mamma kennir stóra sorg yvir hetta, at Elisabeth skuldi fara so tíðliga. Tær vóru væl, og mamma kendi seg kanska viðhvørt í móðir stað, eftir at Mia var farin undir grønu torvu.

Tyngst er tó hjá tykkum Kim, Mariann, Beintu, Magnus og Mo. Tit vóru hennara nærmastu og eg vóni, at tit styrkjast og koma ígjøgnum hesa myrku tíð.

Eg eri takksom fyri at eg kendi Elisabeth og hevði hana til barndómsvin.

**Marna**





## VIÐMERKINGAR

# Tvungna eftirlønarskipanin hjá landsstýrinum verður fólkaflokstryggingin

**- tað váttar landsstýrismaðurin**

**Hans Pauli Strøm,**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*

Umsíðir er uppskotið hjá landsstýrinum um eina nýggja tvungna eftirlønarskipan fyri arbeiðsmarknaðin liðugt. Tað sigur landsstýrismaðurin S. P. í Grund í viðtalu við Dimmalætting týsdagin.

Og hvat bleiv so úrslitið ? Jú, so sum Óli Breckmann vildi hava tað, sum "fólkatryggingin", ið Fólkaflokkurin fór til val uppá fyri skjótt 4 árum síðani. Tað er niðurstøðan, sum kann gerast av tí svari, landsstýrismaðurin gav uppá fyrispurning í løgtinginum ónsdagin.

**Øll samgongan tekur undir, sigur Sámal Petur...**

Vit hava í skjótt trý ár hoyrt um ætlanina hjá landsstýrinum, har allir løntakarar skuldu tvingast til at gjalda upp móti 8-10% av lønini í eina eftirlønartrygging. Men hetta gjørdist beinanvegin eitt av teim nógvu klandursmálunum í samgonguni, sum onki hevur spurst burturúr. Tó, nú sigur so S.P. við Dimmlætting, at uppskotið er liðugt, og at "vit hava roynt at tilsnikkað tað, soleiðis at allir flokkar nú taka undir við tí". Tað má vera samgonguflokkarnarnar, hann meinar við, tí andstøðan ynskir hettar har piparið grør. S.P. roynir at undirstrika ta stóru semjuna: "Endaliga uppskotið fara allir samgonguflokkar at taka undir við".

**...men tað er rúkandi ósemja um tað kortini !**

Tað er ikki rætt, sum Sámal Petur sigur. Uppskotið hongur í leysum lofti. Tað er ikki politiskt grundarlag undir tí. Tað er ikki eingong viðgjørt politiskt í samgonguni. Tann hólmgongan er ikki byrjað enn. Hetta gjørdist greitt, tá ið undirritaði spurdi landsstýrismannin í løgtinginum ónsdagin. Og av samgongufólkum skilst, at uppskotið hevur bara undirtøku frá eini góðari helvt av samgonguni.

Fyrisitingin, bæði í Almanna- og heilsumálastýrinum og í Fíggjarmálastýrinum, situr altso á fjórða ári og arbeiðir við einum uppskoti, um tað ikki er politiskt grundarlag fyri !

**Løgtingið, almenningurin og fakfeløgini eru óviðkomandi...**

Hvat gongur so hetta uppskotið út uppá, sum landsstýrið hevur sitið og bølt yvir í meir enn 3 ár ? Tað helt eg í spurningi mínum, at løgtingið, almenningurin og fakfeløgini høvdu krav uppá at fáa at vita. Nei, tað helt Sámal Petur bestemt ikki, her hevði ongin krav uppá nakað! Ikki fyrr enn einaferð teir í landsstýrinum eru lidnir og samdir - tá kunnu vit sleppa at síggja barnið. Jú, jú, sigur Sámal Petur, sjálvandi skal uppskotið til hoyringar, eisini hjá teimum sum tað handlar um, limirnir í fakfeløgunum. Men ikki fyrr enn alt er leyst og liðugt. Soleiðis er demokratiska mannagongdin, sigur Sámal Petur!

**Ein kombinatión av samhaldsfasta og fólkatryggingini ?**

Tann spennandi nýggjheitin í viðtaluni í Dimmu vóru annars orðini hjá Sámal Peturi, at "talan verður um eina kombineraða samhaldsfasta skipan og eina lívrentu- og kapitalskipan." Eg trúði, at landsstýrismaðurin nú bakkaði fyri tí stóra meirilutanum á løgtingi, sum vil hava ein samhaldsfasta skipan. Tí Sámal Petur skar hetta jú eisini út í papp í Dimmu: "Samhaldsfasti verður ein partur av tvungnu eftirlønini"!

**Nei - tað var bara bluff ! Hetta er reinur fólkaflokspolitikkur !**

Men tað gjørdist greitt av svarinum hjá landsstýrismanninum, at hatta var alt tað bera bluff ! Óivað slongt út fyri at sissa tjóðveldismenninar, sum byrja at fáa ringar nervar av at verða drignir eftir hári av Fólkaflokkinum - eisini í hesum máli.

Uppskotið, sum landsstýrið kemur við, snýr seg bara um eina tvungna uppsparingsskipan til eina privata eftirlønartrygging, sum løntakararnir skulu gjalda sjálvir. Jú størri inntøku, jú størri inngjald, jú størri skattafrádrátt, jú meira í rentu - og jú meira fært tú einaferð útgoldið í eftirløn. Akkurát sum Fólkaflokkurin agiteraði fyri á vári 1998. Nei, her er ikki rúm fyri nøkrum samhaldsfesti.

Hetta er so pensjóns- og eftirlønarpolitikkurin hjá landsstýrinum og samgonguni. Alternativið - sum eisini er taðið fakfeløgini vísa á - er uppskotið hjá Javnaðarflokkinum, at styrkja bæði fólkapensjónina og samhaldsfasta munandi, so allir borgarar fáa eina sømiliga, javnstóra grundpensjón.

*Framhald av síðu 8*

**Rætt skal vera rætt …**

Heimastýrislógin hevur fleiri ymsar mátar at geva føroyingum ávirkan ella ræði á ymsum málsøkjum. Yvirtøkur eftir lista A kunnu gerast bert við at boða frá. Yvirtøkur eftir lista B krevja samráðingar. Yvirtøkur eftir §2 kunnu veita føroyingum heimildir á felagsmálsøkjum. Men harumframt kann løgtingið samtykkja ríkislógartilmæli viðvíkjandi felagsmálum.

Løgmaður eigur at vita, at dómsvaldið er eitt málsøki, har skipanin er, at vit gera tilmæli. Hetta hevur tingið eisini altíð gjørt. Til dømis samtykti tingið fyri tveimum árum síðani tilmæli um serlig krøv til málsligan førleika hjá dómarum. Føroyar hava í veruleikanum longu egna rættarskipan, tí ein serlig rættargangslóg er galdandi fyri føroysk rættarmál, men dómsvaldið liggur hjá ríkinum og dómstólarnir eru ríkisstovnar.

Grønland hevur í dag eina heilt øðrvísi rættarskipan enn ta donsku, serliga innan revsimál. Men dómsvaldið er hjá ríkinum, skipanin er stovnað sambært ríkislóg, og málini kunnu kærast inn fyri eystara landsrætt og hægstarrætt.

Í hvørgum førinum er tó talan, um at dómsvaldið er yvirtikið. Dómsvaldið liggur hjá ríkinum, so leingi vit eru í ríkinum. Hinvegin kann rættarskipanin, tað vil siga málsviðgerðin og bygnaðurin, saktans tillagast til tørvin og ynskini hjá ymsu ríkispørtunum.

Mannagongdin má tó vera eftir teirri stjórnaskipan, sum Føroya løgting hevur samtykt í semju við danska ríkið: ábøtur á rættarskipanina fara fram sum ríkislógartilmæli og við samráðing.

Velur løgmaður hinvegin at leggja fram uppskot um einsíðuga yvirtøku av dómsvaldinum, meðan vit eftir egnum vilja eru í ríkinum, brýtir hann stjórnarskipanina, tvs. bæði heimastýrislóg og stýrisskipanarlóg, og leiðir Føroya fólk út í ein løgfrøðiligan hurlivasa. Tað er av sonnum ein álvarslig støða at koma Føroya landi úti.

# Latum okkum virða okkara livandi føroyska mál

**Ólavur Hátún**

Føroysk málviðgerð hevur í alt ov stóran mun verið merkt av, hvussu mál okkara átti at verið í staðin fyri at viðurkenna málið, sum tað er. Hetta fører ofta við sær løgin orðasnið, sum ikki hava støði í veruliga málinum.

Í seinastum er útvarpið farið at tosa t.d. um Kollfjarða skúla, Fuglfjarða bygdarráð og aðrar slíkar samansetingar. Ivaleyst stendst hetta av, at tað fellur so tungt at siga Kollafjarðar skúli, Fuglafjarðar bygdarráð o.s.fr. Men tað er jú ongin í Norðstreymi, sum sigur annað enn Kollfara skúli, Kollfara kirkja, Kollfara Ítróttafelag o.s.fr., og man ikki fuglfirðingum renna orðið fullgjarað (smbr. hálvfjarað) í huga, tá teir hoyra útvarpið fara soleiðis við teirra bygdarmáli?

Og nú vit eru við hesar bygdir – og vit kundu sjálvandi tikið t.d. bæði Árna fjørð og Oyndarfjørð við –, so fóru vit í Norðstreymi ikki til Kollafjarðar, men til Kollafirðar, mær vitandi fara fuglfirðingar heldur til Fuglafirðar enn til Fuglafjarðar, og nú segði mær árnfirðingur, at tey har norðuri fara heim til Árnafirðar. Vit vita,at orðið bendist fjørður, fjørð, firði, fjarðar, og at fyrisetingin til helst krevur hvørsfall í sambandi við staðarnøvn – til Havnar, til Gjáar, til Eiðis o.s.fr.; men tá talan er um endinga – fjørður, hevur talumálið á staðnum vilja tað øðrvísi, og tað haldi eg, at vit eiga at virða. Hvørjumfallsformin finnur tú jú eisini aftur í orðunum kollfirðingur, fuglfirðingur, oyndfirðingur og árnfirðingur og ongin kundu funnið uppá at sagt kollfjarðingur, fuglfjarðingur etc., sjálvt um slíkar samansetingar vanliga hava hvørsfall – toftamaður, sandavágskona, bíggjarfólk o.s.fr.

Onnur dømi um, at mál okkara ikki er eintáttað í orðasniðum, men loyvir sær fjøllbroytt frávik er t.d. tað, at tú sigur dalmenn um menn sum búgva í Gásadali, norðadalsfólk um tey í Norðadali (hví tyngja um við at skriva Norðradalur?) og dalbingar um fólk í Dali. Somuleiðis vóru tað ikki bíggjarmenn, sum búðu úti á Bø (sunnan fyri Kirkjubø), men bømenn, og tú fert ikki til Kirkjubíggjar, soleiðis sum vit fara vestur til Bíggjar, men til Kirkjubøar.

Endamálið við hesum stubba: Lat okkum ikki framhaldandi við mállærulókskapi gera okkum inn á okkara livandi móðurmál, men heldur lata tað menna seg eftir egnum natúrligum fortreytum.

## Vitjan av Luthersk Missionsforenings Højskole

Í døgunum 22. til 28. sept vitjar Luthersk Missionsforenings Højskole (LMH) í Føroyum. Hetta er ein háskúli, sum navnið sigur, í verður rikin av Luthersk Missionsforening. Skúlin er ein kobineraður háskúli og bíbliuskúli. Teir flestu næmingarnir eru ungdómar í aldrinum 17 til 26 ár.

Skúlin ger hvørt hálvár ein "stórtúr", sum hann verður róptur. Vanliga gongur leiðin suðureftir, men í ár hevur skúlin avgjørt at leggja leiðina norðureftir, nevniliga til Føroyar.

Hetta er sjálvsagt ikki uttan grund. Á skúlanum, sum hevur 78 ár á baki, hava gjøgnum tíðirnar gingið nógvir føroyingar, og vil skúlin tí við hesum túri eisini vísa næmingunum frá Føroyum sítt takksemi fyri teirra leiklut á skúlanum. Hetta verður m.a. gjørt við at skipa fyri einum næminga-kvøldi, sum verður týskvøldið kl. 20 í Leguhúsinum í Nesvík, fyri allar teir næmingar, sum hava gingið á skúlanum.

Eisini kemur skúlin at virka við til møtir kring landið. Leygardagin verða tey í Klaksvík har møti verður í Christianskirkjuni kl. 20. Somuleiðis kemur fyristøðumaðurin á skúlnum, Hans Erik Nissen, at virka við til gudstænastuna í Christianskirkjuni sunnudagin. Sunnukvøldið kl. 19 verða tey til møti í missiónshúsinum á Toftum, og mikudagin kl. 20 verða tey í missiónshúsinum í Leirvík og á Strondum. Tey enda møtirøðina hóskvøldi kl. 20 í Meinigheitshúsinum í Havn.

Við á túrinum hevur skúlin eitt kór, sum kemur at virka við til møtini.

Á holdinum, sum kemur til Føroyar, eru 54 næmingar og 6 lærarar. Tey fara avstað aftur við flogfari fríggjadagin 28. sept.

Um tú vilt vita meira um skúlan, kanst tú vitja heimasíðuna: www.lmh.dk